# Strandingar og traditiónirnar

**Umframt at vera toppdystir er dysturin á Skála eisini undanframførsla av steypafinaluni. Ein uppgerð, sum StÍF hevur fingið sær sum vana at vinna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast vestmenningar hava eitt av mest sigursvandu mansliðunum í landinum, so merkir tað ikki, at sigrarnir koma eins lætt allastaðni.

Hjá verandi manningini man Ítróttarhøllin á Skála vera eitt av støðunum, sum teimum dámar ringast at spæla á. Og úrslitini tala eisini fyri seg í so máta. Hóast VÍF til tíðir hevur verið at kalla einaráðandi í bestu mansdeildini, so hava júst strandingarnir verið teimum sera boysnir. Bæði í Vestmanna og á Skála. Og ikki minst í steypakappingini, kundi hóskandi verið lagt afturat.

Júst tað faktum, at liðini bæði um eina viku skulu dystast í steypafinalu, man eisini geva dystinum sunnudagin eina eyka dimensión at kalla. Tað skerst tó ikki burtur, at tað her og nú er landskappingin, sum telur. Og her hevur hvørgin parturin ráð at missa. StÍF er í løtuni aftast av teimum fýra liðunum, sum stríðast um finalusessirnar. Men við einum sigri á VÍF kunnu teir av álvara opna hetta stríðið aftur. Vestmenningar eru í løtuni á øðrum plássi. Men munurin niður til Kyndil er bara tvey stig, og tí kann fyrimunurin skjótt hvørva.

Hinir báðir dystirnir um vikuskiftið eru av slagnum, har greiðir favoritt-leiklutir eru. Botnliðið, Neistin, tekur ímóti oddaliðnum, H71, leygardagin. Og sunnudagin er tað so Kyndil, sum eigur heimavøll á Hálsi, tá teir taka ímóti KÍF.



*Møguleikin fyri FM-finaluni stendur upp á spæl hjá strandingum, tá teir sunnudagin taka ímóti VÍF*

## Nordlie situr væl

Sambært veddingarfyritøkuni, Nordicbet, er lítil vandi fyri, at Todi Jónsson og teir í Start skulu leita sær eftir nýggjum venjara fyribils. Nú fyrireikingarnar til norsku kappingina av álvara eru farnar ígongd, ber til at vedda um mangt og hvat. Millum annað, hvør verður fyrsti venjarin at fáa sekkin.

Og her bendir lítið á, at Tom Nordlie verður tann fyrstu, sum rýkur. Verður Start-venjarin tann fyrsti venjarin í Tippeliguni, sum fær sekkin í ár, so gevur hetta pengarnar 30 ferðir aftur. Og tað er meira, enn nakar annar venjari gevur. Ovast á listanum stendur Frode Grodås hjá Ham-Kam. Hann gevur bara pengarnar fimm ferðir aftur.

Roknað verður annars við, at Start aftur í ár skal standa seg væl. Tá spælast skal um, hvør verður norskur meistari, er Start fjórð-ovasta navnið á listanum. Ovast er Rosenborg, sum bert gevur pengarnar 2,25 ferðir aftur. Spæl upp á Start gevur odds 8,20.

**-mørk**

# Vandaferð hjá VÍF

**Kanska er talan ikki um seinsta útkall. Men trýstið á VÍF-kvinnunum verður heilt stórt, fáa tær ikki okkurt við sær av Skála**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er nakað væl minni enn ætlað, nú kvinnurnar hjá VÍF bara hava fingið tvey stig burtur úr trimum teimum fyrstu dystunum í niðaru hálvu av Sunset-endaspælinum. Tað merkir, at tær í løtuni eru undir niðurflytingarstrikuni. Ein tanki, sum annars hevur verið veruleikafjarður størsta partin av kappingarárinum.

### Harðar treytir

Nú er hetta tó ein sera ítøkiligur vandi, og tí eru vestmannakvinnurnar nær sagt tvingaðar at fáa nakað við sær av Skála sunnudagin. Gera tær ikki tað, so kann avleiðingin væl verða, at fýra stig eru upp til bjargingina undan teimum báðum seinastu dystunum. Hetta um Søljan vinnur sín dyst móti Tjaldri mikudagin. Tá verða treytirnar hjá VÍF, at tær í fyrsta lagi skulu vinna sínar dystir móti Søljuni og Tjaldri. Og í aðru atløgu, at Søljan ikki fær nakað burtur úr sínum heimadysti - á heimavølli móti StÍF.

Løtt verður uppgávan á Skála tó ikki. StÍF hevur staðið seg sera væl, nú niðurflytingin av álvara er vorðin eitt tema. Og tó at tær taptu greitt í seinnu hálvfinaluni móti Neistanum, so munnu vónirnar undan dystinum sunudagin vera á heilt góðari leið. Ikki minst tí tær við einum sigri endaliga kunnu staðfesta framhaldandi tilveru í deildini.



*Eftir avsmurningin, sum eitt illa mannað VB-lið fekk í Havn, er einki at ivast í, at heimaliðið er tendrað, tá Neistin vitjar í Vági*

### Neistin í Vági

Spenningur er eisini í ovara bólkinum. Sunnudagin skal Neistin spæla í Vági, og tann dysturin líkist eini uppgerð um, hvat av hesum báðum liðum skal kappast við Stjørnuna um fyrimunin, sum ein oddasessur í endaspæinum ber við sær. Fyrra dystin millum liðini í endaspælinum vann Neistin stórsigur. Men til tað er eisini at siga, at VB ta ferðina var rættiliga illa mannað. Og tí verður talan helst um eitt munandi meira uppsett VB, sum hesa ferð ferð á vøllin.

Seinasti dysturin í FM-endaspælinum hjá kvinnum verður í Havn, har Kyndil skal royna at endurtaka heimasigurin frá grundspælinu, tá Stjørnan kemur á vitjan. Tann sigurin var roknaður sum fremsta orsøkin til, at Kyndil vann kapprenningina um fjórða sessin í endaspælinum. Og einki er at ivast í, at klaksvíkarkvinnurnar fegnar vilja hevna tapið.

## Dystaryvirlit

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin - FM-bólkurin**

| Dagur | Klokkan | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 05.02 | 14.30 | Kyndil-Stjørnan | Hallur & Petur |
| 05.02 | 15.00 | VB-Neistin | Rúni & Ragnar |

**Niðari bólkurin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 05.02 | 14.30 | StÍF-VÍF | Eyðun & Andreas |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.02 | 16.00 | Neistin-H71 | Karstin & Kristian |
| 05.02 | 16.00 | Kyndil-KÍF | Hallur & Petur |
| 05.02 | 16.00 | StÍF-VÍF | Eyðun & Andreas |

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.02. | 14.00 | Mjølnir-TB | SÍ |
| 04.02 | 14.00 | ÍF-KÍF | Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.02 | 16.00 | SÍ-Fleyr | Mjølnir |
| 04.02 | 16.00 | ÍF-Nøvan | Mjølnir |